Guttorm Sørensen úr Treystinum verður uttan iva frammaliga á eystanstevnurenningini

Renning á eystanstevnu

Kapprenningar eru seinnu árini vorðnar fastir tættir á stevnunum kring landið

Eins og undanfarin ár ætlar Roysnið at skipa fyri rennikapping á eystanstevnu. Hesar kappingar eru nú fastur táttur á flest øllum stevnum kring landið.

Kappast verður í trimum bólkum leygardagin 17. juni: Børn undir skúlaaldur, børn í skúlaaldri til og við 12 ár og vaksin.

Teinarnir

Børn undir skúlaaldur byrja við Runavíkar Sjómansheim og renna inneftir. Vent verður við Brotið, og síðani renna tey út aftur á mál við Sjómansheimið. Teinurin er einar 600 metrar.

Børn í skúlaaldri byrja sama stað, men renna inn til Føroya Banka, har tey venda. Tey renna síðan út á mál við Sjómansheimið. Teinurin er umleið 1 km.

Tey vaksnu byrja inni við Miklagarð. Runnið verður runt eina leið, sum gongur út eftir Heiðavegi móti Sjómansheiminum, har vent verður oman móti keiøkinum. Runnið verður so inn eftir Gulasteinsvegi, og vent verður niðan aftur á Heiðaveg inni við Føroya Banka. Síðani verður vent út aftur.

Runnið verður góðar 9 ferðir runt, og samlaði teinurin er 10 km.

Partur av Grand-Prix

Umframt, at kappingin hjá teimum vaksnu er triðja umfar av grand prix kappingini hjá Deildarsambandiðnum fyri Súkkling og Frælsan ítrótt, verður vinnarin útnevndur til føroyameistara á 10 km teininum ár 2000.

Byrjað verður eftir hesi skrá:

- 12.00 Tilmelding við Runavíkar Sjómansheim
- 12.30 Børn undir skúlaaldur renna 600m
- 12.45 Børn í skúlaaldri renna 1000m

13.15 Vaksin renna 10 km

Steyp verða latin vinnarunum í øllum aldursbólkum, og nr. 1, 2 og 3 fáa harumframt heiðursmerkir.

Luttøkugjaldið er 20 kr. fyri børn og 30 kr. fyri vaksin.

Dystir hjá A-landsliðnum

Komandi mótstøduliðini hjá A-landsliðnum eru nú funnin

JÁKUP MØRK

Týsdagin varð kastaður lutur um, hvussu bólkarnir til komandi EM-undankapping í manshondbólti verða samansettir.

Føroyar komu í bólk við Sveis, Rumenia og Litava, og skulu Føroysku hondbóltsharrarnir spæla bæði heima og úti móti teimum trimum móttstøðulondunum.

Støðug luttøka

Kappróður: 57 bátsmanningar verða við á eystanstevnu, og er hetta sama talið, sum var á norðoyastevnu

Javnt gekk á hjá 10-mannaførunum á norðoyastevnu, men at enda eydnaðist tað vestmenningum at vinna

JÁKUP MØRK

Næsti FM-róðurin í kappróðraárinum stendur nú fyri framman, og verður hesin á Eystanstevnu í Runavík.

Tilsamans hava 57 bátsmanningar boðað frá luttøku, og er hetta sama tal av bátum, sum luttóku á norðoyastevnu fyri knøppum tveimum vikum síðani.

Nú fyrsti róðurin er rógvin, verða bátarnir lagdir eftir, hvussu teir stóðu seg í undanfarna róðri. Sostatt verður fremsti báturin frá norðoyastevnu mittastur í røðini á eystanstevnu.

Fleiri eru tey, sum fegnast hesa reglu, sum nu hevur virkað í nøkur ár. Hetta ger tað lættari at fylgja bátunum, tá teir nærkast málinum, tí fremstu bátarnir aloftast liggja lið um lið. Ein annar fyrimunur er, at tilvildin í nógv minni mun sleppur at ráða, tí tá bestu bátarnir liggja lið um lið, hava streymviðurskiftini á ymsu firðunum minni týdning, enn tey ofta hava havt fyrr.

Bátarnir á eystanstevnu verða lagdir í hesi nummarrøð:

5-mannafør, dreingir:
1 Báran
2 Spógvin
3 Sílið
4 Kollur
5 Tjaldrið
6 Havfrúgvin
7 Drekin
8 Royndin Fríða
9 Blikur
10 Junkarin

6-mannafør, kvinnur
1 Páll Fangi
2 Sólmundur
3 Fuglfirðingur
4 Jarnbardur
5 Hvessingur
6 Gongurolvur
7 Riddarin
8 Lómur

5-mannafør, gentur
1 Falkur
2 Dúgvan
3 Blikur
4 Bylgjan
5 Tjaldrið
6 Royndin Fríða
7 Hvassi
8 Ørnin
9 Frúgvin
10 Beinta
11 Drekin
12 Sílið
13 Havfrúgvin
14 Súlan
15 Firvaldur
16 Spógvin
17 Junkarin

6-mannafør, menn
1 Snoprikkur
2 Gongurolvur
3 Kollfirðingur
4 Hvessingur
5 Hósvíkingur
6 Strálan
7 Sólmundur

8-mannafør
1 Heiðabáturin
2 Húsavíkingur
3 Oyndri
4 Nevið Reyða
5 Argjabáturin
6 Toftabáturin
7 Gullbrandur
8 Kvívíkingur
9 Miðvingur

10-mannafør
1 Vágbingur
2 Nólsoyingur
3 Vestmenningur
4 Havnarbáturin
5 Eysturoyingur
6 Kjølur

Gongur væl

Súkkling: Rógvi Johansen tykist rættuliga vera komin seg aftur eftir skaðarnar, sum hann hevur drigist við seinastu tíðina

JÁKUP MØRK

Eftir at Rógvi Johansen hevði eina heldur keðiliga byrjan upp á kappingarárið, er hann nú rættuliga um at koma fyri seg.

Um hvítusunnuna luttók hann í trimum súkklukappingum í Viborg.

Stig í báðum greinum

Leygardagin varð kappast í einkultstarti, sum vanliga verður mett sum sterka síðan hjá Rógva. Einir 30 luttakarar vóru við í hesi kapping, og aftur eydnaðist tað Rógva at vinna sær stig í fremstu donsku røðini. Rógvi kom í mál við sjeyndu bestu tíðini, og sigur hann seg vera væl nøgdan við avrikið.

Sunnudagin luttók Rógvi so í 140 km landavegsúkkling, og eisini her eydnaðist tað føroyska súkklaranum at vinna sær DM-stig. Hesu ferð varð talan um eitt 13. pláss, og havandi í huga, at Rógvi dagin fyri hevði luttikið í einkultstartinum, er talan um eitt sera gott úrslit.

Møguliga við í Vági

At enda varð so kappast í Hammel, har Rógvi áður hevur fingið góð úrslit, men hesu ferð gekst ikki nakað serligt.

Eftir einans 5 km. var Rógvi við í einum styrti, og so var møguleikin fyri einum góðum úrsliti í hesari kapping burtur.

Rógvi sigur annars, at hann møguliga verður við á jóansøkusúkklukappingini, men at hetta er ein fíggjarligur spurningur, sum hann enn ikki hevur tikið endaliga støðu til.

Verður Rógvi við á jóansøku, er hann samstundis noyddur at geva avboð til DM-kappingina, men sjálvur sigur hann seg heldur vilja vera við í Vági.

Framskundaður dystur

HB og Sumba spæla í Gundadali í kvøld. Vinnur HB dystin, eru teir fyri fyrstu ferð í á odda í landskappingini

JÁKUP MØRK

Orsakað av luttøkuni hjá HB í Inter-Toto kappingini, er landskappingardysturin móti Sumba framskundaður til at verða spældur í kvøld kl. 18.30.

Á ovastu rók

Einki er at taka seg aftur í, at havnarmenninir eru risafavorittar at vinna dystin, og gera teir tað, vinna teir seg upp á fremsta sessin í føroysku kappingini, tó við einum dysti meira enn næstu liðini.

Allir mans tøkir

HB venjarin hevur sama fólk tókt, sum hann hevur havt undanfarnu dystirnar, og sostatt tykist einasti spurningurin vera, um hann velur at spæla við Jón Róa Jacobsen ella Bárður Mortanssyni við liðuna av toppskjúttanum, Andrew av Fløtum.

Skerdir

Sumbingar koma skerdir til Havnar at gera framskundaða dystin burtur av sær.

Í 6-0 tapinum móti NSÍ vórðu bæði Hallur Dam Joensen og Eirikur Joensen riknir av vølli, og einki er at taka seg aftur í, at hetta verður svárur missur hjá sumbingunum.

Smbingar vóru annars tað liðið, sum higartil í ár hevði fingið fægst gul kort, men tey bæði reyðu um vikuskiftið førdi við sær, at Sumba flutti fleiri pláss uppeftir á fair-play listanum.

EURO 2000 endaspælið

Bólkur A

Støðan

	v	j	t	mál	stig
1 Portugal	1	0	0	3-2	3
2 Týskland	0	1	0	1-1	1
3 Rumenia	0	1	0	1-1	1
4. Ongland	0	0	1	2-3	0

Komandi dystir:

17.06 Rumenia-Portugal
17.06 Ongland-Týskland
20.06 Ongland-Rumenia
20.06 Portugal-Týskland

Bólkur B

Støðan

	v	j	t	mál	stig
1 Belgia	1	0	0	2-1	3
2 Italia	1	0	0	2-1	3
3 Svøríki	0	0	1	1-2	0
4. Turkaland	0	0	1	1-2	0

Komandi dystir:

14.06 Italia-Belgia
15.06 Svøríki-Turkaland
19.06 Turkaland-Belgia
19.06 Italia-Svøríki

Bólkur C

Spania–Noreg 0-1 (0-0)
0-1: Iversen 66.

Jugoslavia-Slovenia 3-3 (0-1)
0-1: Zahovic 23.
0-2: Pavlin 52.
0-3: Zahovic 57.
1-3: Milosevic 67.
2-3: Drulovic 70.
3-3: Milosevic 73.

Støðan

	v	j	t	mál	stig
1 Noreg	1	0	0	1-0	3
2 Slovenia	0	1	0	3-3	1
3 Jugoslavia	0	1	0	3-3	1
4 Spania	0	0	1	0-1	0

Komandi dystir:

18.06 Slovenia-Spania
18.06 Noreg-Jugoslaivia
21.06 Jugoslavia-Spania
21.06 Slovenia-Noreg

Bólkur D

Støðan

	v	j	t	mál	stig
1 Frakland	1	0	0	3-0	3
2 Holland	1	0	0	1-0	3
3 Kekkia	0	0	1	0-1	0
4 Danmark	0	0	1	0-3	0

Komandi dystir:

16.06 Kekkia-Frakland
16.06 Danmark-Holland
21.06 Danmark-Kekkia
21.06 Frakland-Holland

Ørt og óvæntað

Teir báðir dystirnir mánakvøldið fingu eina alt annað enn væntaða gongd, og endiliga fekk okkurt av norðanlondunum stig

Iversen er hægri enn Molina, og so er mál. 1-0 til Noreg

JÁKUP MØRK

Ikki var annað væntandi enn at sponsku favorittarnir fóru at vinna tryggan sigur á norsku grannum okkara, men soleiðis skuldi ikki verða.

Teldufótbóltur

Fyrrverandi norski landsliðsvenjarin, Drillo, varð róptur fótbóltsprofesarin og fótbóltur hansara fyri teldufótbóltur, og leivdirnar av hesum sóust eisini móti Spania.

Norðmenn spældu á sama hátt, sum Føroyar gjørdu í Landskrona á sinni, og úrslitið í teirra fyrsta EM-dysti var hitt sama, sum í okkara fyrsta EM-undankappingardysti takkað verið eina útferð hjá spanska málverjanum.

Ørt

Var úrslitið í fyrra dystinum mánakvøldið óvæntað, var hetta lítið aftur ímóti seinna dystinum.

Í ein góðan tíma vórðu Jugoslavisku stórfavorittarnir blástir av vøllinum av Slovenia, sum fyrr var ein partur av Jugoslavia.

Bara tað at Slovenia hevði dittað sær at vunnið seg fram til endaspælið, og eingin hevði roknað við nøkrum sum helst frá teirra síðu.

Líka løgdu teir í, og tá Mihjovic fyrst legði upp til 3-0 málið fyri síðani at fáa reyða kortið, var líkt til at alt var leyst og liðugt.

Innan seks svakligar minuttir eydnaðist tó Jugoslavia at bjarga øðrum stiginum, hóast tað eisini kravdi eina bjarging á strikuni í seinastu sekundunum av dystinum.

Jú sanniliga var hesin seinni mest undirhaldandi dysturin higartil. Gott álopsspæl, minni gott verjuspæl og dramatikkur í serflokki.

Róligt

Komandi tíðin verður heldur róligari framman fyri skíggjan. Bert ein dystur í gjár og ein í dag, men so kemur aftur ferð á.

Tveir dystir um dagin fram til 21., tá heili fýra dystir standa á skránni.

Um støðið framhaldandi verður eins høgt, er bert eitt at gera. Sessast við fjarstýringini í hondini.

EM-stubbar

UEFA sigur nei

Tá Italia í gjár fór á vøllin at spæla móti Belgia, var tað fyrstu ferð í fimtan ár, at eitt italskt lið setti fót á leikvøllin, har 39 Juventus áskoðarar doyðu fyri 15 árum síðani.

Ta ferðina æt leikvøllurin Heysel, men í dag hevur hann skift navn til King Baudoin Stadion.

Italska fótbóltssambandið hevur spurt UEFA um loyvi til at minnast deyðu áskoðarnar við tøgn í 1 minutt, men UEFA hevur noktað fyri hesum.

Broytt odds

Ensku veddingarfyritøkurnar hava broytt sonevndu oddsini nakað, nú øll liðini hava spælt ein dyst hvør. Undan endaspælinum var Holland favorittar at vinna, men nuu verða fransmenninir tiknir fram um.

Frakland gevur pengarnar 3 ferðir aftur. Holland og Spania eru næst heitastu favorittarnar, og geva tey pengarnar ávíkavist 3,5 og 5 ferðir aftur, um spælt verður upp á tey.

Radal leikbannaður

Kekkiski verjuleikarin, Radoslav Latal, fekk reytt kort, aftaná at verða útskiftur í dystinum móti Hollandi, og hevur tí leikbann í dystinum móti Fraklandi.

Ongar fylgjur

Enski landsliðsvenjarin, Kevin Keegan, hevur sagt, at tað fær ikki fylgjur fyri David Beckham, at hann eftir dystin móti Portugal vísti ensku áskoðarunum, hvat hann helt um atburð teirra.

Danir hvíla seg

Heili tíggju av donsku leikarunum hvíldu seg týskkvøldið, ístaðin fyri at vera við til landsliðsvenjingina.

Danir hava í løtuni fleiri trupulleikar við meira og minni álvarsligum skaðum, og tí er umráðandi at leikararnir fáa neyðugu hvíldina, verður sagt úr donsku venjingarleguni.

Staam klárur

Hollendski verjurisin, Jaap Staam, sum noyddist út, tá tað restaðu einir 20 minuttir móti kekkum, verður klárur aftur, tá Holland í morgin spælir móti Danmark.

Tað sá annars ógvusligt út, tá Staam mátti seymast í skallanum, men skaðin hevur helst ikki verið so álvarsligur kortini.

Bót til turkar

Turkiska fótbóltssambandið hevur fingið eina bót áljóðandi £ 4.000, orskað av atburðinum hjá áskoðarunum.

Tá dómarin í 70. minutti bríkslaði fyri brotssparki til Italia, í dystinum moti Turkalandi, kasaðu áskoðararnir millum annað fløskur inn á vøllin, og hetta vil UEFA undir ongum umstøðum góðtaka.

Broytingar hjá svium

Svenska venjaraparið hevur boðað frá broytingum á liðnum til dystin móti Turkalandi í dag.

Broytingarnar, sum tó meira eru orsakaðar av neyð heldur enn ónøgd, raka meint í verjupartinum, har sviar mugu verða tveir royndar leikarar fyri uttan. Patrik Andersson fekk reyða kortið móti Belgia, meðan Roland Nilsson fekk heilaskjálvta eftir samanbrest í sama dysti.

Tveir toppskjúttar

Málríkasti dysturin í endaspælinum higartil, 3-3 dysturin millum Jugoslavia og Slovenia týskvøldið, viðført eisini, at talan nú er um tveir toppskjúttar í EM endaspælinum.

Slovenski Zahovic og Jugoslaviski Milosevic, hava báðir skotið tvey mál hvør, og tað hevur eingin annar megnað.

Sostatt er líkt til, at jugoslaviski Milosevic hevur tikið seg fram, síðani hann fyri tveimum árum síðani spældi í Aston Villa. Tá varð hann eyknevndur »miss-a-lotsevic«.

Kluivert fremstur

Hóast hann enn ikki hevur skotið mál í endaspælinum, er hollendski Patrick Kluivert framvegis fremsti favoritturin at gerast toppskjútti.

Ensku veddingarfyritøkurnar rinda peningin 7,5 ferðir aftur, um Kluivert verður toppskjútti. Raul og Henry geva peningin átta ferðir aftur, um spælt verður á teir.